# Fyribilsskattaskráin 2001
# Fríir ágóðar v.m.

Hjá teimum, sum hava ymisk framíhjárættindi sum part av lønini, ásetur Toll- og Skattaráð Føroya eina ferð um árið virðið á hesum lunnindum, og eru virðini fyri 2001 hesi, íroknað meirvirðisgjald:

| | | |
|---|---|---|
| a) Virðið á fríum bústaði: | | |
| íbúð (partur av húsum) pr. $m^2$ | kr. | 429 |
| íbúð (heil hús) pr. $m^2$ | kr. | 338 |
| b) Eginnýtsla av el | kr. | 6.200 |
| c) Eginnýtsla av olju | kr. | 13.200 |
| d) Frí telefon | kr. | 4.500 |
| e) Virðið á fríum kosti pr. dag: | | |
| 3 máltíðir | kr. | 79 |
| 2 máltíðir | kr. | 60 |
| 1 máltíð | kr. | 44 |
| f) Virðið á fríum bili: | | |
| 1100 kg og undir | kr. | 43.900 |
| 1101 kg til 1300 kg | kr. | 56.200 |
| 1301 kg og meira | kr. | 70.200 |
| Allir aðrir bilar, sí viðmerking | kr. | 32.925/21.950 |

**Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi**
Privatur vinnurekandi skal skatta av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skatta av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til privatnýtsluna, tá tað snýr seg um t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal gera eina neyva metan av, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla, og skal henda metan vera við atliti til stødd á t.d. húsi og húski.

Sum leiðbeinandi minstamark hevur Toll- og Skattaráð Føroya tí ásett hesi virði fyri nýttar vørur:

| | | |
|---|---|---|
| g) Eginnýtsla av vørum: | | |
| Bakarar | kr. | 6.400 |
| Bakarar við keypmansvørum | kr. | 8.400 |
| Keypmenn | kr. | 21.600 |
| Leiðbeinandi minstamark fyri privatnýtslu av bili hjá hýruvognsførara er | kr. | 15.300 |
| h) Virðið á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum: | | 10% |
| i) Kapitaleftirlønarfrádrátturin er hægst | kr. | 41.400 |
| j) Frádrátturin fyri donsk lesandi | kr. | 60.000 |

**Viðmerking til »Allir aðrir bilar« undir f)**
Omanfyri nevndu upphæddir eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum.

Fyri bilar skrásettir sum vørubilar eftir § 5 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 75% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Fyri aðrar bilar enn omanfyri nevndu t.d. bilar skrásettir eftir § 6 og § 8 í 11. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 50% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Toll- og Skattstova Føroya tilskilar sær rætt at krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

*Tórshavn, 15. desember 2000*
**Toll- og Skattaráð Føroya**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# Verkfrøðingur til Fiskirannsóknarstovuna

Á Fiskirannsóknarstovuni er eitt starv sum verkfrøðingur til Umhvørvisdeildina leyst at søkja. Starvið fevnir um at halda viðlíka og útbyggja kanningarútgerð og at viðgera kanningartilfar. Umsøkjarin skal vera verkfrøðingur innan elektronikk í minsta lagi á B.S. stigi. Starvið krevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og kunnleiki til havfrøði ella royndir við líknandi uppgávum eru ein fyrimunur. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi fakfelag.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. februar 2001 og verður at senda til:

**Fiskirannsóknarstovuna**
Box 3051
FO-110 Tórshavn

Frítíðarheimið í Skrivaragøtu søkir 2
# Pedagogar

annar at arbeiða 40 tímar og hin 30 tímar um vikuna frá 1. mars. Talan er um skriftandi arbeiðstíðir og í vikuskiftum.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Frítíðarheimið er ein samdøgursstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.

Endamálið við arbeiðinum er m.a. at skapa tryggar karmar hjá brúkarnum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum hevur áhuga fyri teir einstøku bólkarnar/brúkarnar. Umráðandi er, at tann sum verður settur kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran ella varaleiðaran, tlf. 313353, millum kl. 8 og 16.

Umsóknarfreistin er 1. februar, og umsóknirnar skulu stílast til:

**Stýrið fyri Frítíðarheimið**
Skrivaragøtu 5
100 Tórshavn

# Pakkar sendir við Bygdaleiðum

Frá 01.01.2001 at rokna er prísurin á pakkum, sum verða sendir við Bygdaleiðum, broyttur.
Pakkar 0-1 kg kosta 50 kr.
Pakkar 1-25 kg kosta 100 kr.

**Strandfaraskip Landsins**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**
**Skrásetingar-nr.** P/F 3109
**Navn:** P/F Gael Force Marine
**Adressa:** Niðan Horn 2, Postbox 24, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 09.11.2000
**Viðtøkudato:** 09.11.2000
**Kapitalur:** Kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Gael Force Marine Equiment Ltd., Island Road, Stornoway, Lewis, Scotland HS1 2RD og Gullak Gullaksen, Bumshamarsvegur 23, 700 Klaksvík.
**Nevnd:** Ólavur Jákup Kristoffersen, Marinargøta 20, 188 Hoyvík (formaður), Gullak F. Gullaksen, Bumshamarsvegur 23, 700 Klaksvík og Stewart Graham, Hebrides, Nairnside, Inverness IV2 5GX, Scotland.
**Stjórn:** Gullak F. Gullaksen, Bumshamarvegur 23, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra saman við einum nevndarlimi, tveimum nevndarlimum saman ella av allari nevndini.
**Grannskoðari:** : Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 09.11.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka keyp og sølu av útgerð til ali-, fiski- og oljuvinnu og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. januar 2001

Kristin Balle

**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**
- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

Vit útvega eftir tygara tørvi!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

# ítróttur

Nr. 6 • mikudagur • 10. januar 2000 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


Enn er ikki greitt, hvar Pacek fer at spæla í ár, men B36 tykist vera besta boðið í løtuni

## Pacek til B36

**Hóast formaður felagsins ikki vil gera nakrar viðmerkingar, so kundi bent á, at pólverski verjuleikarin verður í høvuðsstaðnum komandi kappingarár.**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein liður í stóru frágongdini, sum KÍ upplivdi í fjør, var at sterki pólverski verjuleikarin, Andrzej Pacek, var á veg burtur frá felagnum.

Síðani hava fleiri boð verið um, hvat felag mundi fara avstað við verjuleikaranum, men enn tykist einki endaligt, at vera komið í lag hesum viðvíkjandi.

Treiskastu leysasøgurnar hava vilja verið við, at pólverjin skal vera ávegis til B36, har landsmaðurin, Piotr Krakowski, er venjari.

Hvørt hetta er rætt ella ikki, hevur ikki eydnast okkum at fáa endaliga uppspurt. Kristian á Neystabø, formaður í B36, vil hvørki vátta ella avsannað tíðindini, so tað kundi bent á, at okkurt er um at verða avgjørt við fótbóltsframtíðini hjá Pacek.

## Yngru landsliðini byrja


*Vónandi verður lagið á ungu landsliðsleikarunum eins gott í heyst, sum tað var í fjør summar*

**Fyrsta úttøkuvenjingin hjá U-16 landsliðnum verður um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Venjarin hjá U-16 landsliðnum hevur tikið út 29 leikarar til fyrstu úttøkuvenjingina hjá U-16 landsliðnum.

Venjingin verður á Svangaskarði komandi leygardag frá kl. 10.30 til 16.00.

Teir 29 leikararnir í hópinum eru: Rókur F. Jespersen, Eli Thorsteinsson, Jóhan E. Mouritsen, Páll M. Joensen, Arnbjørn Hansen, Emil N. Leifsson og Gunnar Nielsen úr HB, Marni Djurhuus og Búgvi Øster úr EB/Streymi, Ingi Højsted, Bergur Midjord, Hallur Sørensen, Bogi Hermansen og Jónas Tór Næs úr B36, Justinus R. Hansen, Petur Oluf Herason og Justinus H. Hansen úr NSÍ, Magnus Skoralíð úr LÍF, Símun Samuelsen og Poul N. Poulsen úr VB, Rasmus Nolsøe úr TB, Tummas Pauli Olsen úr B71, Høgni Madsen úr ÍF, Jósup Hendriksen og Allan Tungá úr KÍ, Kristian A. Andreasen, Jóhan Petur Poulsen og Fróði Jensen úr B68, Sverri Jacobsen úr GÍ. Leiðarar á venjingarleguni verða U-16 venjarin, Mathias Davidsen og Pætur Clementsen, sum er hjálparvenjari.

## Østergaard ilskast á UEFA

**Stjórin í FCK er illur um, at einki hendir í málinum um sonevndu euroliguna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at fleiri av miðalstóru europeisku feløgunum fyri góðum mánaði fundaðust við UEFA um sonevndu euroliguna, er ikki hent stórt meira í málinnum.

Síðani hevur UEFA gjørt av »frysta« málið, og tað er hetta, sum hevur fingið ilt í Flemming Østergaard.

### Ov stór umsiting

Við danska blaðið, Politiken, sigur hann, at UEFA nýtir pening til alt annað enn til sjálvan fótbóltin. Millum annað sigur skrivstovuna hjá UEFA vera størri enn tær, sum stóru altjóða virkini nýta, og eisini finst hann at, at ikki færri enn 21 mans vóru í Keypmannahavn - í trimum umførum - undan UEFA-cup finaluni, sum varð leikt í Parkini.

Í UEFA eru tey ósamd við Østergaard, og varaforsetin, Per Omdal, svarar aftur við at siga, at umsitingin hjá UEFA ikki er ov stór.

Um euroliguna sigur Omdal, at viðgerðin av hesi varð tikin í sera stórum álvara, áðrenn endalig støða varð tikin.

Um málið við euroliguni sigur Østergaard annars, at tað framhaldandi verður arbeitt við hesum, og at feløgini fara at hava nýggjan fund um hetta í næstum.


*FCK stjórin, Flemming Østergaard, er ótolin eftir, at okkurt skal henda viðvíkjandi ætlaðu euroliguni*

## Nestin styrkir liðið

**Mánadagin kom ein nýggjur neistaleikari til landið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er helst eingin loyna, at hetta kappingarárið ikki hevur verið eitt hitt besta hjá Neistanum. Í øllum førum ikki, um sammett verður við gullárið í fjør.

Allarhelst vórðu málini heldur ikki sett eins høgt undan hesum kappingarárið. Uttan styrk hevur liðið tó ikki verið, men satsingin tykist tó ikki at hava verið eins stór, sum hon var í fjør.

Hinvegin munnu viðhaldsfólk felagsins einki hava ímóti, at liðið fær onkran styrk, og sum skilst er tað júst hetta, sum er í ferð við at henda í løtuni.

Undir øllum umstøðum kom 24 ára gamli Rune Møller til landið í gjár, og ætlanin er so, at hann skal spæla við felagnum, tað sum eftir er av kappingarárinum.

Enn tykist kunnleikin til nýggja leikaran tó at vera avmarkaður, og okkum hevur ikki eydnast at fáa uppspurt, á hvørjum plássum hann spælir